Vesturvón
Heilsurøkt - alt lívið

# Starvs- og persónsprofilur

Deildarleiðari og dygdarmennari

## Innnihaldsyvirlit


**Innnihaldsyvirlit** ..... 1
**Inngangur** ..... 2
**Um Vesturvón** ..... 2
    **Bygnaður** ..... 2
    **Starvsfólk og virksemi** ..... 2
**Um starvið** ..... 3
    **Starvið sum deildarleiðari** ..... 4
    **Starvið sum dygdarmennari** ..... 4
**Førleikakrøv** ..... 4
    **Formligir førleikar** ..... 4
    **Persónligir leiðsluførleikar** ..... 4
**Vit bjóða:** ..... 5
**Løn og setanartreytir** ..... 5

Vesturvón
Heilsurøkt - alt lívið

## Inngangur

Hesin starvs- og persónsprofilur lýsir uppgávurnar í starvinum og krøvini, ið sett verða til førleikar og persónligar eginleikar. Endamálið er at geva viðkomandi starvsfólki eina mynd av starvinum og tí, sum Vesturvón væntar sær.

## Um Vesturvón

Tænasturnar eru skipaðar eftir Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 62 frá 9. mai 2019. Endamálið við tænastunum er, at: *Fyribyrgja sjúku, stimbra sálarliga og likamliga heilsu og trivna borgarans, endurmenna mistan førleika, stimbra møguleika hins einstaka at klára seg sjálvan, at veita rehabilitering, fyribyrgjan, røkt og umsorgan*.

Vesturvón veitir borgarum við tørvi eina samskipaða heildartænastu, sum tekur atlit til tørv, trivnað, fortreytir og sjálvsavgerðarrætt hins einstaka, og sum eisini ger tað gjørligt hjá øllum at verða heima longst gjørligt.

### Bygnaður

Vesturvón er skipað millumkommunalt. Ovasta leiðslan er eitt politiskt stýri, sum kommunustýrini í Vága og Sørvágs kommunum velja. 3 limir eru frá Vága kommunu og 2 frá Sørvágs kommunu. Borgarstjóranir eru sjálvskrivaðar/ir í stýrið og skiftast um at vera forkvinnur/formenn í stýrinum 2 ár í senn. Stýrið setir stjóran, og stjórin setir deildarleiðarar í samráð við stýrið.

### Starvsfólk og virksemi

Í løtuni starvast umleið 100 fólk hjá Vesturvón.

Umleið 150 fólk fáa tænastur. Talan er um eina samskipaða tænastu, sum kann vera heimahjálp, heimasjúkrarøkt, mattænasta, dagtilboð, fyribyrgjandi rørðsluvenjingar og fyribyrgjandi heimavitjanir til borgarar yvir 75 ár. Harumframt eru 37 búð-, rehabiliterings- og umlættingarpláss á Heiminum á Sýnini.

Heimið á Sýnini hevur 2 búeindir, umframt umlætting og rehabilitering. Eisini eru venjingarhøli, vaskarí, reingerð, terapeutar og røktarstarvsfólk, sum halda til á Heiminum á Sýnini.

Á 1. hædd eru: Stór venjingarhølir til fyribyrgjandi-, viðlíkahalds- og endurvenjingar til stórar og smáar bólkar, smærri rúm til heimahjálp, sjúkrarøkt og  ergo- og fysioterapi. Nøkur rúm eru til sansastimulatión og ítriv.

Á 2. hædd eru: búpláss umframt køkur, móttøka og fyrisitingarhøli.

Á 3. hædd eru: búpláss, umframt umlætting, rehabilitering, palliatión og skrivstovur.

Vesturvón
Heilsurøkt - alt lívið

## Um starvið

Starvið er í tveimum: Deildarleiðari hjá heimasjúkrarøktarfrøðingum og heimahjálpum og dygdarmennari.

### Starvið sum deildarleiðari

Deildarleiðarin hevur leiðsluna av heimasjúkrarøktarfrøðingum og heimahjálpum hjá Vesturvón.

Leiðslan er her sett upp í trý ábyrgdarøki:

***Fakliga leiðsluábyrgdin***

Deildarleiðarin skal tryggja fakliga støði í tænastum okkara og dagligu uppgávunum hjá heimasjúkrarøktini og heimahjálpini. Meira ítøkiliga er ábyrgdin hjá deildarleiðaranum at:

- Støðugt eftirmeta og menna arbeiðsgongdir og tryggja, at Vesturvón fylgir kravdum fakligum standardum og leiðreglum
- Skjalfesta, góðskumenna og tryggja, at lógir og leiðreglur verða fylgdar
- Seta faklig mál, sum gera, at Vesturvón røkkur yvirskipaðu málunum sambært lógini og visjónini
- Hava vitan, áhuga og førleikar at seta ígongd og leiða starvsfólk í tvørfakligum arbeiðsgongdum, eins og útdelegera uppgávur og fakliga ábyrgd til starvsfólk, motivera og geva feedback
- Saman við starvsfólkunum seta týðilig og ítøkulig krøv til fakliga støðið, har gerandisdagurin er merktur av at verða innihaldsríkur og mennandi
- Vísa góðan leiðsluførleika og sjónligan vilja og evni at virka í einum leiðslutoymi, sum er sinnað at nýta tvørfakliga tilfeingið, sum er í Vesturvón

***Starvfólkleiðsla***

Deildarleiðarin hevur starvsfólkaábyrgd av heimasjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum, heilsuhjálparum og heimahjálpum.

Í starvsfólkaleiðsluni eru uppgávurnar annars at:

- Seta og loysa úr starvi starvsfólk í samráð við stjóran
- Gera grund- og arbeiðsætlan í skipanini “vaktplan” og tilrættarleggja avspáking og feriu
- Førleikamenna og eggja starvsfólkum til at røkka málum
- Tilrættarleggja, skipa fyri og góðkenna eftirútbúgvingar og skeiðvirksemi, saman við stjóranum
- Loysa trupulleikar og ósemjur á virðiligan hátt og skapa eitt gott arbeiðsumhvørvið, sum tryggjar fakliga dygd og trivnað

***Rakstrar- og fíggjarleiðsla***
Deildarleiðarin hevur mótvegis stjóranum fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd.

Deildarleiðarin hevur ábyrgd av at boða stjóranum frá viðurskiftum, sum ikki eru í lagi ella eiga at verða broytt.

Deildarleiðarin hevur mótvegis stjóranum ábyrgd av, at fíggjarætlanin fyri økið verður fylgd, og at játtanin heldur, eitt nú við einaferð um mánaðan at vátta samlaðu nýtsluna hjá deildini.

### Starvið sum dygdarmennari
Dygdarmennarin hevur ábyrgdina av at menna og samskipa eitt dygdargott, lærandi umhvørvi á Vesturvón. Dygdarmennarin tryggjar, at tænastur, tilboð og mannagongdir støðugt dagførast, mennast og verða samskift hóskandi í organisatiónini. Meira ítøkiliga virkar dygdarmennari fyri at:

- Savna hagtøl og gera kunnandi tilfar
- Gera mannagongdir, dagføra og menna hesar, og fáa viðkomandi kunnandi tilfar til viðkomandi málbólkar
- Virka sum bindilið fyri fakligari dygd, undirvísa, og sum heild hava eyga fyri dygdini hjá Vesturvón
- Samskipa og saman við stjóranum taka avgerð um starvsfólkaluttøku í uttanhýsis skeiðum, tryggja og eftirmeta, hvussu hetta í størst møguligan mun kann koma Vesturvón til gagns

## Førleikakrøv
Deildarleiðarin skal hava sum mest av hesum førleikum:

### Formligir førleikar
- Prógv og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðigur
- 3-5 ára starvsroyndir á eldraøkinum
- Neyðugt er at hava telduførleika á brúkarastøði og evni at seta seg inn í skipanir, ið verða brúktar á økinum.
- Kunnleiki til og áhugi fyri leiðslu og fyrisiting er ein fyrimunur, eins og kunnleiki til viðkomandi lógir, faklig krøv og standardir á økinum.

### Persónligir leiðsluførleikar
Deildarleiðarin skal hava førleikar og áræði at leiða, ganga undan og verða fyrimynd í menningini, og seta sín dám á arbeiði.

Í hesum liggur m.a., at deildarleiðarin skal:

- Vera miðvís/ur, skipað/ur, reflekterandi og megna broytingar
- Síggja møguleikar, menning og tilfeingi í aldrandi borgaranum og virða teirra lívssøgu og lívsstøðu
- Hava áhuga og góð evni at samskifta við starvsfólk, avvarðandi og borgarar
- Megna at fremja sjónliga leiðslu

## Vit bjóða:

- Eitt spennandi starv, har tú ger sjónligan mun
- Eitt starv við spennandi fakligum avbjóðingum í nýggjum umhvørvi, og við nýggjum leiðslubygnaði
- Leiðslumenning í skipaðum leiðslufelagsskapi við føstum leiðslufundum
- Stóra ávirkan á menningina av tænastum og tilboðum hjá Vesturvón

## Løn og setanartreytir

Deildarleiðarin vísir til stjóran í Vesturvón

Starvið er full tíð, starvsstaðurin er á Heiminum á Sýnini í Miðvági

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum KAF og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.